# Framsýningarnar hjá Havnar Fimleikarafelag



Árligu fimleikaraframsýningarnar hjá Havnar Fimleikarafelag byrja hetta vikuskiftið í høllini á Hálsi

Fimleikaraframsýningarnar eru deildar upp soleiðis:

Leygardagin klokkan 10 eru tað smærri børn, eitt nú øll liðini við børnum undir skúlaaldri, sum sýna fram.

Klokkan 13:30 eru tað børn, eitt nú øll lið við børnum í 1. – 3. flokki

Klokkan 17 eru tað ung, eitt nú øll lið við ungum í 4. – 6. flokki, sum sýna fram sín dugnaskap

Mánadagin kl 19 eru tað vaksin – frá 7. flokki og eldri.

Havnar Fimleikarfelag sigur, at til allar fimleikaraframsýningarnar verða framførslur við kappingarliðum í reiðskapi og estetiskum kappingarliðum, herumframt verða merki og íðnisprógv handað fimleikarunum eftir hvørja framsýning.

Atgongumerkjasølan byrjar ein tíma undan framsýningini, og er kostnaður 80 krónur fyri vaksin og 20 krónur fyri børn. Avsláttur verður givin, um vaksin keypa atgongumerki til fleiri framsýningar.

- Havnar Fimleikarfelag, sum hevur 1200 íðkandi limir, verður 100 ár í ár - og økist áhugin fyri fimleiki fyri hvørt ár, nærri upplýsingar um felagið og nærri skrá fyri framsýningarnar eru á heimasíðu felagsins www.hf.fo.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Hvassur vindur ella skrið av landnyrðingi, seinnapartin minni vindur av norði. Kavaælingur, men onkur sólglotti seinnapartin. Hitalagið millum frostmarkið og minus 3 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin minni vindur. Um kvøldið frískar hann vindin av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum minus 1 og +2 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av útsynningi og regn. Seinnapartin upp í strúk í vindi av vestri og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í hvassan vind av útnyrðingi og norði og kavaælingur, Hitin um frostmarkið. Týsdagin Strúkur í vindi av eystri og regn. Hitin upp í eini 8 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -16 |
| Nuuk | -9 |
| Qaqortoq | -3 |
| Ammassalik | -5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 9 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | -5 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 19 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 15 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 15 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 6 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt djúpt lágtrýst , 972 hPa. skamt í útsynning úr Føroyum fer eystureftir.



**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Hetland fer spakuliga eystureftir og dregur kalda luft av norði móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/03 kl. $06^{00}$ – 25/03 $06^{00}$. Hitin í gjár: 4,2°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 24/03 kl. $06^{00}$ – 25/03 $06^{00}$.
Avfallið higartil í mars: 112 mm




Javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

19. mars — Mánin longst frá jørðini
26. mars — Tendring
2. apríl — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. mars | 06:09 | 18:29 | 05:09 | 17:29 | 05:24 | 17:44 | 08:09 | 20:29 | 09:09 | 21:29 | 04:24 | 16:44 |
| 27. mars | 06:49 | 19:09 | 05:49 | 18:09 | 06:04 | 18:24 | 08:49 | 21:09 | 09:49 | 22:09 | 05:04 | 17:24 |
| 28. mars | 07:31 | 19:54 | 06:31 | 18:54 | 06:46 | 19:09 | 09:31 | 21:54 | 10:31 | 22:54 | 05:46 | 18:09 |
| 29. mars | 09:19 | 21:43 | 08:19 | 20:43 | 08:34 | 20:58 | 11:19 | 23:43 | - | 12:19 | 07:34 | 19:58 |
| 30. mars | 10:09 | 22:36 | 09:09 | 21:36 | 09:24 | 21:51 | - | 12:09 | 00:43 | 13:09 | 08:24 | 20:51 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. mars | 03:24 | 15:44 | 06:24 | 18:44 | 07:24 | 19:44 | 05:54 | 18:14 | 07:09 | 19:29 |
| 27. mars | 04:04 | 16:24 | 07:04 | 19:24 | 08:04 | 20:24 | 06:34 | 18:54 | 07:49 | 20:09 |
| 28. mars | 04:46 | 17:09 | 07:46 | 20:09 | 08:46 | 21:09 | 07:16 | 19:39 | 08:31 | 20:54 |
| 29. mars | 06:34 | 18:58 | 09:34 | 21:58 | 10:34 | 22:58 | 09:04 | 21:28 | 10:19 | 22:43 |
| 30. mars | 07:24 | 19:51 | 10:24 | 22:51 | 11:24 | 23:51 | 09:54 | 22:21 | 11:09 | 23:36 |